Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Steig Nielsen, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Miðfyrisitingin

Spurningar:

1. Hvør er árligi kostnaðurin av aðalráðunum árini 2019 – 2023?

Viðmerkingar:
Hetta er ein uppfylging uppá spurning 52-133/2023, ið eg setti í juni í ár, har løgmaður ikki svaraði, hvør árligi kostnaðurin av miðfyrisitingini er í krónum.

Hóast haldførið var høvuðstema, tá CEF-samgongan varð skipað, byrjaði samgonguskeiðið við at økja talið á landsstýrisfólkum og aðalráðum úr sjey upp í níggju, og nógv bleiv gjørt burturúr, at hetta var fíggjarliga skynsamt og fór ikki at krevja fleiri starvsfólk í miðfyrisitingini.

Sjálvur segði løgmaður, at ætlanin var, at miðfyrisitingin skuldi ikki kosta fleiri almennar skattakrónur.

Nú hálvtannað ár er liðið, hava verið lýsingar til fleiri nýggj størv í miðfyrisitingini, og tríggir nýggir aðalstjórar eru settir. Tí ynskist at fáa upplýst, hvør árligi kostnaðurin av aðalráðunum er fyri árini 2019 – 2023.

Á Løgtingi, 1. august 2024

Bárður á Steig Nielsen